**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Svartkalvi. Túrur nr. 1626.**
**Tíðarskeið: 15/6 - 22/6 – 2016.**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Marit Pedersen, Jens Arni Thomassen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin.
Eisini var hitin við botn skrásettur. Nytru- og magaprøvar vóru eisini tiknir av longu, brosmu og blálongu.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper grunnur, breitlar 120 m og nýggjar Vágshurðar. Trolað varð vanliga í umleið 6 tímar.

**Um túrin:**
Fóru av Havnini hósdagin 16/6 kl. 13:00 og byrjaðu at royna í vestara kanti á Munkagrunninum. Har høvdu vit tvey hál og fóru síðan suður á endan á Munkagrunninum, har vit høvdu eitt hál. Máttu sigla inn til lands, tí hol var á skipinum. Vóru á Havnini náttina til leygardag, kl. 02:15. Fóru útaftur mánadagin 20/6 kl. 10:30. Byrjaðu í norðara kanti og tóku støðir eystureftir og síðan suðureftir móti kaðalinum. Tilsamans vórðu 8 góðkend hál tikin á túrinum. Vóru á Havnini kl. 9:00, har vit landaðu. Veðrið var gott allan túrin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 22. juni 2016.

**Fyribilsúrslit:** Tað var minni at fáa av svartkalva í mun til í fjør (Talva 1), sum var eitt gott ár. Tó skal úrslitið takast við fyrivarni, tí tað vóru bert 8 hál og eisini var túrurin umleið 3 vikur seinni á árinum enn vanligt.

**Talva 1**. Veiða (kg), og nytrur tiknar á túri 1626.

| FISKASLAG | KG<br>8 hál | Nytrur | KG<br>29 hál 2015 | Lutfall<br>Kg per hál |
|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 3773.316 | 95 | 28220.411 | 0.48 |
| TRANTKONGAFISKUR | 272.927 | | 5613.856 | 0.18 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 254.811 | | 1804.996 | 0.51 |
| TINDASKØTA | 181.192 | | 4361.241 | 0.15 |
| HALAHVASSA SKØTA | 55.910 | | 793.855 | 0.26 |
| UPSI | 52.565 | | 1421.180 | 0.13 |
| BLÁGÓMUR | 33.850 | | 251.903 | 0.49 |
| BROSMA | 27.775 | 10 | 971.681 | 0.10 |
| TOSKUR | 16.890 | | 150.945 | 0.41 |
| BLÁLONGA | 16.770 | 4 | 825.918 | 0.07 |
| SVARTKJAFTUR | 13.527 | | 148.091 | 0.33 |
| HVÍTASKØTA | 9.112 | | 731.425 | 0.05 |
| LÁLLA | 7.785 | | 89.757 | 0.31 |
| KLINGRUSKØTA | 5.077 | | 161.772 | 0.11 |
| LONGA | 3.660 | 1 | 341.822 | 0.04 |
| ULVFISKUR | 3.611 | | 2.021 | 6.48 |
| GULLAKSUR | 2.620 | | 34.670 | 0.27 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 2.510 | | 205.808 | 0.04 |
| HVASSASPREK | 2.280 | | 32.757 | 0.25 |
| LOLIGO | 0.835 | | 0.000 | |
| SKRAMBUL | 0.740 | | 9.016 | 0.30 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 0.280 | | 3.890 | 0.26 |
| LÍTLA LAKSATOBIS | 0.030 | | 0.000 | |
| TILSAMANS | 4738.073 | 110 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru at finna í dokumentinum Tur1626d.doc.



Petur Steingrund